UTTAN ÚR HEIMI



*Fær Niger ikki matvøruhjálp skjótt, kunnu 150.000 børn har doyggja í hungri*

# 150.000 børn fara at doyggja í hungri

**Varaaðalskrivarin hjá ST ákærir heimssamfelagið fyri at venda tað blinda eygað til hungursneyðina í afrikanska landinum Niger**

HUNGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fær Niger ikki hjálp frá altjóða samfelagnum sum skjótast, fara 150.000 børn at doyggja í hungri. Men higartil hevur heimssamfelagið vent tað blinda eygað til.

Tað sigur norðmaðurin Jan Egeland, sum er varaaðalskrivari í ST, og sum hevur ábyrgdina av at samskipa neyðhjálpararbeiðið hjá heimsfelagsskapinum. Hann vísir á, at starvsfólk hjá hjálparfelagsskapum, sum eru í Niger, hava gjørt vart við, at børn doyggja sum flugur har suðuri í landinum.

Hjálparfelagsskapirnir siga, at 2,5 milliónir fólk eru hótt av hungursneyð, teirra millum 800.000 børn. Jan Egeland sigur við BBC, at heimssamfelagið hevur leingi vitað, at fólkið í Niger fór at líða hungur orsakað av miseydnaðari grøði, men at eingin hevur tikið ávaringarnar í álvara.

- Nú hava vit so kreppuna, og í hesari stund doyggja børn har í hungri, sigur hann við BBC.

Síðsta heyst ávaraðu serfrøðingar um, at fekk Niger ikki altjóða matvøruhjálp, fór fólkið at líða hungur. Í mai bað ST altjóða samfelagið veita hjálp fyri 16 milliónir dollarar, men sambært Jan Egeland kom næstan ikki eitt oyra inn til hjálpina. Nú hevur ST so biðið um at fáa 30 milliónir dollarar, og hesaferð hava nøkur lond svarað játtandi, sigur hann. Eitt nú hava Danmark, Noreg, Svøríki, Týskland, Belgia, ES og USA lovað at veita hjálp fyri 10 milliónir dollarar.

---

**Ein amerikanskur kongresslimur heldur, at Vesturheimurin eigur at svara teimum muslimsku yvirgangsmonnunum við at bumba heilaga stað teirra, Mekka**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

- Fáa vit eina atsókn afturat, og tað kann prógvast, at álopsmenninir eru vígongdir muslimar, eiga vit at svara aftur við at søkja at teirra heilagu støðum, sigur republikanski kongresslimurin úr statinum Colorado, Tom Tancredo. Spurdur, um hann sipaði við heilaga muslimska staðin Mekka, svaraði hann játtandi.

Orðini hjá kongressmanninum hava fingið øði í muslimar í USA, sum krevja, at hann skal taka tey aftur. Eisini turkiski uttanríkisráðharrin, Abdullah Gúl, sigur seg vera skelkaðan av tí, sum kongresslimurin segði.

- Slíkt er fullkomiliga ábyrgdarleyst. Maðurin hevur ikki gjørt sær greitt, hvat slíkt kann elva til, og hetta er so óheppið, sum tað kann vera, sigur hann. Abdullah Gúl leggur afturat, at hann uggar seg við, at hvørki amerikanska stjórnin ella amerikanska fólkið taka undir við sjónarmiðunum hjá Tom Tancredo.

Men heilt einsamallur er hann ikki, tí teir seinastu dagarnar hava fleiri lesarabrøv í amerikonskum bløðum tikið undir við hugskoti hansara um at bumba Mekka.

---

## Vesturheimurin hevur skyldina

Borgarstjórin í London, Ken Livingstone, heldur, at Vesturheimurin eigur ein part av skyldini av, at muslimskir yvirgangsmenn gera seg inn á vesturlendsk mál.

Ken Livingstone sigur, at hann fordømir sjálvmorðsbumbuatsóknir, men at hann duigir at skilja, at lagnan hjá tí palestinska fólkinum hevur fingið summar arabar at gera tað, sum teir gera. Hann vísir á, at palestinar eru undir fremmandari herseting, teir hava einki arbeiði og ráða ikki yvir egnum viðurskiftum. Var hetta í Bretlandi, høvdu vit eisini havt okkara sjálvmorðsbumbumenn, sigur Ken Livingstone í samrøðu við BBC.

Hann leggur Vesturheimin undir dupultmoral og vísir á, at Vesturheimurin fegnaðist, tá Saddam Hussein kom til valdið í Irak. Hann nevnir eisini, at amerikanararnir stuðlaðu Osama bin Laden í áttatiárunum, og at teir lærdu hann at gera bumbur, sum hann skuldi brúka ímóti sovjetska hersetingarvaldinum í Afghanistan. Men amerikanararnir grunaðu ikki, at hann ein dag fór at venda sær og bumbunum ímóti teimum, sigur "Red Ken".

## Írar boykotta Statoil

Fleiri írskir umhvørvisverndarfelagsskapir og politiski flokkurin Sinn Fein hava mælt sínum limum og øðrum til at boykotta allar bensinsølurnar, sum Statoil hevur í Írlandi. Talan er um einar 300 støðir.

Maura Harrington, sum samskipar átakið, sigur við Aftenposten, at felagsskapirnir og Sinn Fein eru misnøgd við, at norska oljufelagið nýtir írsku oljuleiðirnar sum eitt slag av einum royndarøki. Tað ber í sær, at felagið brúkar ymsa útgerð, sum er skaðilig fyri umhvørvið og tey, sum búgva í Mayo-landspartinum, sigur hon. Tey vilja eisini vera við, at Statoil fer alt ov lætt um trygdina hjá fólki og vísa á, at í tí eina førinum hevur felagið lagt eina gassleiðing bara 70 metrar frá teimum næstu sethúsunum.

Leiðslan í Statoil vísir øllum skuldsetingunum aftur. Felagið vísir á, at írska stjórnin hevur góðkent allar verkætlaninar, og felagið avsannar eisini, at tað brúkar ótrygga útgerð í Írlandi. Norska umhvørvisverndarfelagið heldur kortini, at Statoil átti at lagt størri dent á at verja umhvørvið í Mayo-landspartinum, enn gjørt verður.

## Polanski í rættinum

Tann heimskendi filmsleikstjórin Roman Polanski hevur stevnt amerikanska blaðnum Varity Fair, sum vil vera við, at leikstjórin royndi at fáa samband við eina aðra kvinnu sama dag, sum myrda kona hansara, Sharon Tate, fór til gravar. Sharon Tate og fýra onnur vórðu myrd í Los Angeles í 1969.

Tvey fólk, sum vóru saman við Roman Polanski tann dagin, konan skuldi til gravar, hava greitt Varity Fair frá, at leikstjórin hevði hug at fjasa við eina kvinnu, sum eitur Beatte Telle. Eitt nú vilja tey vera við, at hann var í so næskur, og at hann beyð sær til at gera hana til filmsstjørnu. Hetta hevur fingið øði í tann 71 ára gamla Polanski, og nú hevur hann stevnt Varity Fair fyri ærumeiðing.

Roman Polanski, sum er ættaður úr Pólandi, er kendur fyri filmar sum "The Pianist", "Chinatown" og "Rosemary's Baby". Tey seinastu nógvu árini hevur hann búð í Fraklandi.

## Landið rindar ikki parúkkar

Í Týsklandi hevur ein dómstólur nú staðfest, at berskøllutir menn hava ikki krav upp á at fáa parúkk frá tí almenna.

Ein 46 ára gamal maður í býnum Dresden hevði lagt sak ímóti myndugleikunum. Hann vísti á, at sambært týskari lóg kunnu berskøllutar kvinnur fáa endurgjald fyri parúkk frá tí almenna, og tí helt hann, at menn skulu hava sama rætt. Men rætturin vildi ikki geva honum viðhald, skrivar Reuters úr Dresden. Rætturin helt ikki, at tað ber til at samanbera menn og kvinnur í hesum føri. Sambært rættinum kann ein berskøllut kvinna fáa trupulleikar í samfelagnum, men tað er ikki galdandi fyri menn, stendur í úrskurðinum.

Tann berskølluti saksøkjarin noyðist tí at gjalda tær 440 evrurnar, sum parúkkur hansara kostaði.